Álit

í

løgtingsmáli nr. 17/2020: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur lagt málið fram tann 9. september 2020, og eftir 1. viðgerð tann 15. september 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. september, 8. og 20. oktober og 12. og 24. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Peningastovnar, LÍV, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Tryggingareftirlitið, Skráseting Føroya og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Endamálið við Hvítvasklógini er at hava amboð til at forða fyri, at brotsfólk misbrúka føroyskar fyritøkur og fíggjarligu skipanina til at hvítvaska pening og til at fíggja yvirgang. Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force).

Vinnunevndin heldur, at Føroyar hava skyldu at viðvirka í altjóða stríðnum móti brotsmannaliðum og kriminaliteti. Men samstundis er umráðandi, at hvítvasklóggávan er snikkað til føroysk viðurskifti, og ikki oysir byrokratiskar reglur og krøv omanyvir vinnufyritøkur, sum í støddd í allar flestu førum eru smáar og hava fá starvsfólk, sammett við fyritøkur út í heimi. Lóggávan má tí ikki vera óneyðug ella órímiliga orkukrevjandi og dýr fyri vinnuna. Og hon má ikki skapa yvirdrivið eftirlit og leggja krøv og meinbogar fyri borgaran í hesum landi. Lóggávan skal geva meining fyri Føroyar og fólkið her. Tí hevði nevndin ynskt, at lógin í størri mun var skorin eftir føroyskum leisti heldur enn týdd beinleiðis úr ES-lóggávu.

Vinnunevndin vísir á, at tað í lógini eru ávísir møguleikar fyri at gera undantak frá krøvunum um strangt eftirliti við kundum í virksemi, har mett verður, at vandi ikki er fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi. Nevndin mælir landsstýrismanninum til, tá lógin hevur virkað eina tíð, at eftirmeta hesa og gera møguligar tillagingar hóskandi til føroysk viðurskifti.

Uppskotið til hesa hvítvasklóg verður galdandi fyri fyritøkur, sum virka undir føroyskari lóggávu – tað er lívstryggingarfeløg, grannskoðaravirkir, meklarar, realkredittstovnar við fleiri, sum lýst í §1 í lógaruppskotinum. Peningastovnarnir virka longu undir líknandi danskari lóggávu.

Sambært uppskotinum verður skipanin broytt frá einari í høvuðsheitum reglubundnari skipan til at vera meira váðagrundað skipan. Hetta fyri, at bæði persónar, fyritøkur og myndugleikar kunnu leggja størri dent á og brúka mest orku upp á at fyribyrgja har, sum váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størstur. Uppskotið setir í verk eina eftiransingarskyldu soleiðis, at fyritøkur og persónar skulu halda eitt vakið eyga við virkseminum hjá kundum teirra, og tá serliga virksemi, sum mett verður at kunna hava tilknýti til hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Uppskotið byggir í høvuðssheitum á 4. hvítvaskdirektivið hjá ES frá 2015. Her vil nevndin gera vart við, at ES longu í 2018 samtykti 5. hvítvaskdirektivið við freist í januar í ár fyri limalondini at seta

broytingarnar í verk. Landsstýrismaðurin hevur fyri nevndini upplýst, at hann metir fyriliggjandi lógaruppskot vera nøktandi í mun til at lúka altjóða skyldur.

VÁÐALÝSING AV FØROYSKA VANDANUM FYRI HVÍTVASKI VIÐ MEIRA
Vinnunevndin heldur, at ein váðameting átti at verið gjørd av øllum teim tættum í føroyska samfelagnum, sum eru viðkomandi í mun til hvítvasklóggávu. Ein váðagreining, sum gjølla kann lýsa, í hvørjum liðum, vinnugreinum, skipanum í Føroyum og handilssambondum við ymisk lond, størstu vandarnir hjá okkum liggja. Henda greining hevði verið sera munagóð fyri at seta dyggast eftirlit í verk har, sum vandin er størstur. Og hevði tænt myndugleikum, vinnu og borgarum, sum skulu virka undir hvítvasklóggávuni.

Dømini í lógaruppskotinum eru donsk, men tað er eyðsæð - bæði tá hugt verður eftir samfelag, skipanum, vinnulívi og handilssambondum – at grundleggjandi munur er á Føroyum og flest øðrum londum, og ein váðafyribyrgjandi skipan í Føroyum tí ikki eigur at vera eitt nágreiniligt avrit av danskari lóggávu. Nevndin mælir til, at landsstýrið tekur stig til at gera eina slíka váðameting.

VIRKISSKRÁ NEYÐUG
Vinnunevndin hevur í viðgerðini sett fokus á tørvin á, at eigaraskrá ella virkisskrá verður ment til Skráseting Føroya. Í virkisskránni er skráseting av vinnufyritøkum og eigarum, umframt aðrar viðkomandi upplýsingar.

Víst er í nevndarviðgerðini á, at gjøgnumskygnið við eigaraviðurskifti í føroyskum vinnufeløgum er versnað seinastu árini. Hetta tí at § 74 í ársroknskaparlógini - um krav um upplýsingar í ársfrásøgn um stórpartaeigarar - varð strikað, tí áseting um eigaraskrá hjá Skráseting Føroya var lógarásett í Vinnufelagalógini. Men ásetingin í Vinnufelagalógini hevur við kunngerð verið sett úr gildi, meðan bíðað hevur verið eftir menning av skipani. Eigaraskráin skuldi at byrja við vera partur av Talgildu Føroyum, men varð útsett vegna vantandi fígging. Fíggjarmálaráðið vísir í uppskoti til løgtingsfiggjarlóg fyri figgjarárið 2021 á, at "Við inntøkunum frá kommunum, sum eru komnar á sumri 2020, umframt játtan frá landinum 2021, ber nú til at bjóða út at menna Virkisskránna. Væntað verður, at henda kann verða liðug og klár at nýtslu í 2022."

Vinnunevndin heldur, at tað eigur at fáa høga raðfesting at menna eigaraskrá/handhavaraskrá undir Skráseting Føroyar. Nevndin fekk upplýst, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið nú fór undir at fyrireika útboð.

UPPLÝSINGAR LATNAR DONSKUM SKIPANUM
Fráboðanarskylda er hjá teimum, sum eru fevnd av lógini, til Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og Interational Kriminalitet. Somuleiðis kann Tryggingareftirlitið í ávísum førum lata upplýsingar til føroyskar, danskar og grønlendskar myndugleikar. Nevndin heitir á landsstýrismannin um at tryggja, at føroyskir myndugleikar fáa alt neyðugt innlit í, hvussu fráboðanir og tilfarið, latið útlendskum myndugleikum, verður handfarið og brúkt. Og at føroyskir myndugleikar fáa upplýsingar, hvat hendir víðari í málum, sum eru fráboðað til danska eftirlitsmyndugleikan. Hesar upplýsingar kunnu eisini vera týðandi partur av teirri føroysku váðametingini, sum Vinnunevndin mælir til.

VARSKÓGVARASKIPAN
Fyritøkur, fevndar av lógini, og sum hava fleiri enn fimm fólk í starvi, skulu hava eina skipan, har starsvfólk ónavngivið skulu kunnu fráboða mistanka um brot á hvítvasklóg – og reglur. At so smáar fyritøkur skulu hava eina sjálvstøðuga whistleblowerskipan, har fólk verða verðandi anonym eftir fráboðan, virkar umstendiligt og ikki serliga sannlíkt, at til ber at vera anonymur. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum kunnu, eftir avtalu við fyritøkuna, stovna eina skipan í t.d. einum fakfelag, har tey starvssettu í fyritøkuni kunnu fráboða brot.

Nevndin heitir á landsstýrismannin um at stuðla uppundir og eggja til, at felags skipan fyri smáar vinnufyritøkur verður skipað, so starvsfólkini veruliga eru vard, um tey fráboða óreglusemi, og so skipanin kann virka.
Fyri fíggjarligar fyritøkur undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum, verður whistleblower-skipan ásett í løgtinslóg um tryggingarvirksemi í uppskoti, sum kemur næsta heyst, sambært viðmerkingunum í lógaruppskotinum.

KONTANTGJALD OG ÁBÆRIR PERSÓNAR
Markið fyri, hvussu nógv, ið gjaldast kann við kontantum pengum verður lækkað úr 100.000 kr. niður í 50.000 kr. Nevndin heldur ikki, at grundgevingarnar fyri hesi lækking í føroyskum høpi eru serliga sannførandi. Hóast flestøll hava gjaldskort, so brúka fólk og vinna her heima framvegis nógv reiðan pening. Nevndin mælir landsstýrismannum til at eftirmeta, um henda lækking skapar óneyðugar avbjóðingar fyri borgarar í Føroyum, og um tað yvirhøvur er neyðugt at lækka markið.

Landsstýrismaðurin upplýsti fyri nevndini, at hann í komandi ár kemur í Løgtingið við uppskoti til ríkislógartilmæli um at seta “lov om betalinger” í gildi í Føroyum.

Hvítvasklógin setir eisini krøv um serstakt eftirlit við virksemi hjá millum øðrum politiskt ábærum persónum, og listar skulu gerast yvir hesar persónar. Hetta er millum teir tættir, sum nevndin ivast í, hvørt føroysk viðurskifti í nóg stóran mun eru hugsað inn í reglurnar.

Samanumtikið mælir Vinnunevndin til, umframt at gera gjølla váðagreining, eisini at eftirmeta alla hvítvasklóggávu, so vit í strembanini eftir at liva upp til altjóða krøv ikki leggja eina rød av óneyðugum og dýrum forðingum fyri borgarar og vinnu í Føroyum.

Eitt dømi er lógarkravdar pensjónsuppsparingar, har uppsparing er tvungin, og sáttmáli millum pensjónsfelag og kunda ikki kann sigast upp, fyrr enn tryggingartakarin er 67 ár. Onnur dømi kunnu eisini vera.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 1. desember 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	